

# Boripallur fekk uppgávu við at geva 45 prosent í avsláttri

**Jógvan Hugo Gardar**

20.08.2015 - 22:55

Oljan.fo

Feløgini sum eiga boripallar stríðast í hesum døgum fyri at fáa nokk av uppgávum til pallarnar. Í dag komu boð um at Transocean hevur longt avtaluna fyri Transocean Barents.

Boripallurin er leigaður av Shell til at bora enn ein royndarbrunn í heyst. Tað er Transocean sum boðar frá tí.

Avtalan sum pallurin hevur havt hevur givið eigarunum 574.000 dollarar um dagin í leigu. Nú lækkar leiguprísurin við 45 prosentum til umleið 300.000 dollarar.

Offshore.no skrivar í dag at eitt tilboð um royndarboring á Vette-økinum (fyrrverandi Bream) er sent feløgunum sum hava boripallar. Hetta er eitt av sera fáum nýggjum

royndarboringum sum eru á norska landgrunninum í ár. Sambært Offshore.no eru 28 boripallar tøkir sum kunnu gera hesa uppgávuna. Sagt verður ikki hvat boringin kemur at kosta, men roknast kann við at leiguprísurin verður umleið 300.000 dollarar. Hendan boriniætlanin er, saman við tveimum avmarkingarbrunnum, mett at taka 470 dagar.